## Føroyar stuðla og veita ráð um móðurmjólk

Uttanríkisráðið hevur gjørt av at stuðla Mercy Corps við 627.000 kr. til at seta í verk ætlanina at byggja upp eitt fyrimyndarumhvørvi viðvíkjandi bróstageving Endamálið er at seta í verk áheitanina hjá heilsustovninum undir Sameindu Tjóðum um heilsupolitikk á pinkubarnaøkinum, sonevndu "Ten steps to Successful Breastfeading", sigur uttanríkisráðið í tíðindaskrivi. Ein partur av verkætlanini er, at jarðarmøður og læknar í Jakarta fáa vitan um føroyskan politikk og mannagongdir á økinum. Hetta verður gjørt saman við Ljósmøðratænastuni og Barnatænastuni hjá Nærverkinum. Uttanríkisráðið sigur, at mett verður, at okkara heilsupolitikkur á pinkubarnaøkinum kann blíva ein førleiki, har Føroyar kunnu veita serkøna ráðgeving. Smábarnadeyði í Indonesia er lutfalsliga høgur, og kanningar vísa, at smábarnadeyðin hevði minkað við 22%, um børnini fingu móðurmjólk innan fyrsta tíman eftir føðing.



# Føroyar mugu marknaðarførast betri

**Tað er av alstórum týdningi, at Føroyar verða marknaðarførdar rætt og effektivt, sigur Súsanna Sørensen, ið starvast á Samvit. Ferðavinnudagur var 31. oktobur, og millum vørumenning, íslendska framferðarháttin og stovnan av ferðavinnufelagi, var marknaðarføring eitt av evnunum**

FERÐAVINNA

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Súsanna Sørensen er deildarleiðari á SamVit. Hon metir at við betri og meira fokuseraðari marknaðarføring kunnu Føroyar koma longri við ferðavinnuni.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

- Tað er av stórum týdningi fyri grundarlagnum undir ferðavinnuni, at ferðafólk koma til landið, sigur Súsanna Sørensen. Við væl skipaðari og gjøgnumførdari marknaðarføring, ber tað til at hækka talið av útlendskum ferðafólkum, sum koma til Føroya.

Hon vísir á, at tað er dýrt at koyra stór lýsingarátøk uttanlands, til dømis kostar ein prentað blaðlýsing í einum stórum blaði nógv, men tað er ivasamt hvussu nógv hon munar. Í staðin skulu vit í Føroyum hyggja eftir øðrum marknaðarføringsm øguleikum, so sum gjøgnum alnótina. Fyrst og fremst skulu vit hava góðaar føroyskar heimasíður og harumframt kunnu vit velja at lýsa á heimasíðum hjá ávísum málbólkum, sum vit halda verða áhugaverdar fyri Føroyar. Til ber eisini á alnótini at máta úrslit av átøkum á alnótini rættiliga neyvt, soleiðis at tað ber til siga í hvønn mun tað arbeiðið virkar.

Tað er ein týdningarmikil og upplagdur møguleiki, at gera vart við Føroyar sum ferðavinnuland, á støðum, har Føroyar longu er í fokus. Í sambandi við ítróttartiltøk og listaframsýningar uttanlands. Samvit skipaði, saman við Smyril Line og Atlandic Airways fyr tiltøkum fyri fjølmiðlum og ferðasmiðum í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Italia í Moderna í fjør og eisini í sambandi við stóru føroysku listaframsýningini í Wien í ár, har yvir 80.000 vitjaðu. Tann málbólkurin, ið sær lýsingarnar verður beinleiðis og persónligt rokkin í tí rætta umhvørvinum.

### Besta oyggjasamfelag

Í stóru kanningini, sum National Geographic Traveler gjørdi í fjør heys, vóru Føroyar valdar til at vera besta oyggjasamfelagið í heiminum av 522 serfrøðingum.

- Hetta er ein gyltur møguleiki hjá okkum at gera vart við Føroyar, og vit hava eisini nýtt úrslitið av kanningini í okkara marknaðarføring av Føroyum síðan. Asorurnar komu á eitt annað pláss, og tær nýta tað til lýsingar og vinnulig endamál, sigur Súsanna Sørensen. Hon heldur, at við at nýta kanningina til fulnar, hava Føroyar longu eitt sterkt grundarlag undir lýsingum, ið kunnu fáa fleiri at ferðast til Føroya. Hon metir, at ein slík kanning og at vit skulu brúka úrslitið av kanningini meira viðvíst í allari marknaðarføring av Føroyum.

Súsanna Sørensen heldur eitt uppskot vera at nýta hana í øllum ferðavinnulýsingum, ið verða nýttar uttanfyri landoddarnar. Til dømis við seta forsíðuna av National Geographic Traveler í einari lítlari mynd, sum eitt stempul ella búmerki, á hvørja lýsing.

### Samstarv er lykilin

Um vinnan og almenni myndugleikin innan ferðavinnu samstarva, er lættari og ikki minst bíligari at fáa nógv frá hondum. Ein týðandi partur av marknaðarføringin av Føroyum er at bjóða útlendskum fjølmiðlum til Føroyar. Umrøðan frá útlendskum fjølmiðlum hevur størri trúvirði enn um vit seta lýsingar í bløðini, og er eisini ein rættiliga bíligur háttur at fáa umrøðu uppá.

Hóast hugskotini eru nógv, so mugu bæði vilji og fígging til, áðrenn málið er rokkið. Nógv eru, ið ynskja at ferðavinnan í Føroyum fær betri dagar.

# Fish Expo verður í Gundadali

**Í mai verður Fish Expo Faroes framsýningin aftur í Havn. Seinast varð hon hildin á Sandvíkarhjalla, men í 2009 verður alt tiltakið í Gundadali. Bæði fyrireikararnir og kommunan vænta at njóta gott av hesi umlegging**

TÍÐINDAFUNDUR

*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Stevnan Fish Expo Faroes verður altíð dúliga vitjað. Millum tey vitjandi teljast flest føroyingar, men undirtøkan millum útlendingar stendur í vøkstri. Í ár vera vónandi um 300 ymiskir framsýnarar, ið umboða fleiri ymisk lond. Øll fiskivinna verður umboðað, har

Í ár verður framsýningin hildin í Gundadali í Havn, har stór tjøld verða reist á øðrum av fótbóltsvøllunum. Tað heldur Petur Mohr Reinert vera innlýsandi, sum á tíðindafundi í Miðlahúsinum fyrrapartin greiddi frá, at hon skuldi vera í Havn. Talið av bústaðarplássum er størst í Havnini og somuleiðis eru sera góðir møguleikar rundan um økið. Um stevnan fevnir um meira enn bara framsýning, er møguligt at nýta millum annað Norðurlandahúsið til fyrilestrar. Møguligt verður hjá virkjum, sum hava stórar vørur, at nýta plássið uttandura. Men sjógvurin verður eisini nýttur til ymiskar framsýnarar og framvísingar.

Í sambandi við at kommunan fyllir 100 ár, verður eisini skipað fyri ymiskum øðrum, ið framsýningarluttakararnir kunnu njóta. Heðin Mortensen, borgarstjóri, greiddi frá, at hetta tiltakið kann blása lív í býin hesar dagarnar.

### Fleiri útlendingar

Talið av vitjandi útlendingum hevur undanfarin ár ligið um 12,5%, men fyrireikararnir ynskja at hækka tað. Góðir bústaðarmøguleikar eru í Havnini, í samstarvi við Greengate Incoming eru hotellini í býnum til reiðar at taka ímóti nógvum gestum hetta tíðarskeið.

Fish Expo Faroes hevur eisini staðið fyri at marknaðarføra seg uttanlanda, teir hava verið á stevnum uttanlanda, har teir við básum hava gjørt vart við hetta tiltak, ið verður. Eisini á alnótini ber til at finna meira kunning og at bíleggja básar. Heimasíðurnar www.fishexpofaroes.fo og www.fex.fo vórðu lagdar út í morgun.




*Tíðindafundurin um Fish Expo Faroes var hildin í Miðlahúsinum í morgun. Petur Mohr Reinert greiddi frá ætlanunum fyri komandi stevnu.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*